# Hannis & Eyðun døma

**Fyrsta árið teir døma saman, sleppa teir báðir kyndlararnir at døma helst størsta dystin á árinum, og tað taka teir sum ein stóran heiður**

GULLDYSTUR
*Jákup Mørk*

Tað verða Hannis Wardum og Eyðun Samuelsen, sum skulu stýra brakinum í Vestmanna. Teir báðir hava alt árið talst millum bestu dómararnar í landinum, og í so máta er einki forgjørt í, at teir nú sleppa at runda árið av við einum slíkum dysti.

Hóskvøldið hittu vit annan teirra, Eyðun Samuelsen, á máli, og hann var ikki í iva, tá vit spurdu hann, um hetta kendist sum eitt herðaklapp fyri árið.

– Tað er so einki at ivast í. Eg vil næstan siga, at hetta er størsta avbjóðingin tú kanst fáa sum dómari her heima. Nú alt hevur lagað seg soleiðis, er hetta enntá størri enn steypafinalan, tí her stendur meistaraheitið upp á spæl.

## Røtt kemi

Sjálvur hevur Eyðun dømt nakað áður, men talan hevur tó verið um drúgvan steðg, inn til hann í fjør so spakuliga tók eina hond við hjá Hannis, tá tað barst frá hjá Una Wardum.

Tá Uni so gjørdist venjari hjá hoyvíkingum var greitt, at ársins dómarapar frá í fjør so ikki fór at døma aftur í ár, og so hevði Kyndil tørv á nýggjum pari. Upprunaliga skuldi tað verið Rúni Mohr og Eyðun Samuelsen, men tá hesin fyrri heldur vildi verið meira aktivur á vøllinum, ringdi Eyðun til Hannis, sum annars hevði ætlað at lagt floytuna á hillina.

– Hann segði beinan vegin ja. Vit dømdu jú nakrar dystir í fjør, og vit føldu beinanvegin, at vit høvdu røttu kemi'ina okkara millum, og samanum tikið, so haldi eg eisini, at tað hevur gingið hampuliga væl hjá okkum í ár, sigur Eyðun.

## Stuttligt

Og tá tosið aftur fellur inn á gulldystin, viðgongur Eyðun eisini, at eins og hjá leikarunum, so mugu dómararnir eisini gera sítt heimaarbeiði til slíkar dystir.

– Vit hava longu dømt hesi bæði liðini tvær ferðir í ár, og tað hevur gingið hampuliga væl. Tað gevur okkum eisini tann fyrimun, at leikararnir vita, hvar vit standa og ikki minst, hvar okkara mørk eru.

– Men hartil, so hava vit eisini hugt at tveimum øðrum dystum hjá liðunum. Hetta fyri líka sum at fyrireika okkum enn betri, tí hetta er jú ein heilt serligur dystur, og tað skerst ikki burtur, at vit eru spentir til uppgávuna.

– Og so er tað eisini stuttligt, at dysturin er í Vestmanna. Har eru áskoðararnir altíð við í dystinum, og intensiteturin í høllini er øgiligur. Tað eru júst slíkir dystir, sum gera tað stuttligari at døma, og saman við steypafinalunum er ein møguleiki sum hesin heilt víst nakað, sum ger hugin enn betri í so máta, sigur Eyðun Samuelsen at enda.



*Tað verður fyrst og fremst spælið við bóltinum, sum Ingi Olsen fer at hugsa um leygardagin. Venjaralutin verða tað í stóran mun aðrir, sum koma at taka yvir*

# Skulu stýra sjálvir

**Ingi Olsen er ikki í iva um, at skal VÍF vinna, so skal dysturin spælast eftir teirra fortreytum, men hinvegin ætlar hann eisini at fyrireika liðið sum best til mótstøðuna**

GULLDYSTUR
*Jákup Mørk*

Tá seinasta venjingin á árinum endaði hjá vestmenningum, var ikki heilt liðugt við fyrireikingunum kortini. Allir sum ein vórðu leikararnir bidnir um at koma í eina av skúlastovunum í Vestmanna Skúla, har teir umvegis sjónband eina seinastu ferð kundu gera sær eina fatan av, hvussu mótstøðan fer at verða leygardagin.

## Eftir okkar fortreytum

Eftir at hann hevði fingið allar leikararnir inn í rúmið, fingu vit eitt stutt prát við venjaran hjá VÍF, Inga Olsen. Og hóast hann viðgekk, at hetta var ein partur av fyrireikingunum, so tóktist hann ikki vera so nógv fyri at tosa um strandingarnar.

– Nú verður hetta sjónbandið ikki nøkur komplett gjøgnumgongd av liðnum hjá StÍF. Skulu vit vinna dystin, so skulu vit í størstan mun spæla upp á okkara egnu fortreytir.

– Men tá tað er sagt, so er tað sjálvandi eingin loyna, at strandingar hava nakrar styrkir, sum vit skulu ansa eftir. Stórsta hóttanin eru sjálvandi teir tríggir bakspælararnir, sum vanliga fáa sera nógv burturúr, og har mugu vit so finna upp á ráð at steðga teimum. Men hinvegin hava teir so kanska onkur øki, har teir ikki eru heilt so sterkir, og tey mugu vit so eisini royna at raka.

– Og so tosa sjálvandi nógv eisini um málverjan. Hann er sjálvandi góður, so har er bara eitt hjá okkum at gera, og tað er at skjóta betri. Eg haldi í øllum førum, at vit standa einki aftan fyri teir, hvat skotstyrki viðvíkur, men vit hava tó havt onkrar trupulleikar við hesum í árinum. Ikki minst tí upptaktin hjá okkum mest sum varð oyðiløgd, tá Sámal og partvíst Áki vóru skaddir.

## Seinastu trumfarnir

Tað er tó ikki bara skotstyrki og gott verjuspæl, sum eru trumfirnir hjá VÍF leygardagin.

Til hesa seinastu venjingina vóru fleiri væl kend andlit at síggja, og Ingi váttar eisini, at partur av »gomlu garduni« verður við hesaferð.

– Vit hava mest sum tømt aðru deild, soleiðis at hópurin hjá okkum verður so breiður sum gjørligt leygardagin, og tað tænir eisini onkrum endamáli. Vit hava í nógvar mátar verið ov tunnir í seinastuni, og við hesum monnunum kunnu vit kanska geva øðrum leikarum nakað av hvíld ígjøgnum dystin. Eisini kann tað geva mær betri frið til bert at hugsa um spælið hendan dagin, heldur enn eisini at vera venjari, tí tað hevur heilt víst órógvað viðhvørt.

– Og so vita vit eisini, hvat hesir menninir standa fyri, og tað at spæla avgerandi dystir er so avgjørt ikki nakað nýtt fyri teirra viðkomandi. Og so er tað eisini tað, at vit skulu vinna dystin. Vit hava tørv á øllum hugsandi styrki., og kann hetta vera ein hjálp, so tænir tað sínum endamáli, sigur Ingi Olsen at enda.

## Dystir um vikuskiftið

### Hondbóltur

**1. deild kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 12.04 | 14.30 | Neistin-Kyndil |
| 12.04 | 14.30 | Tjaldur-VB |
| 12.04 | 14.30 | VÍF-StÍF |

**1. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 12.04 | 16.00 | Neistin-Kyndil |
| 12.04 | 16.00 | Tjaldur-H71 |
| 12.04 | 16.00 | VÍF-StÍF |

### Fótbóltur

**Kappingin um Løgmanssteypið**

**Bólkur 1**

| | | |
|---|---|---|
| 12.04 | B68-TB | Páll Augustinussen |
| 12.04 | FSV-NSÍ | Jens Petur Brattalíð |

**Bólkur 2**

| | | |
|---|---|---|
| 12.04 | EB/S-KÍ | Suni Johansen |
| 13.04 | VB-AB | Lassin Isaksen |

**Bólkur 3**

| | | |
|---|---|---|
| 12.04 | Skála-HB | Niklas á Líðarenda |
| 12.04 | B36-GÍ | Dagfinn Olsen |



# Tøl siga ikki alt

**Tað kann altíð vera stuttligt at tríva í hagtølini, tá lið skulu styrkismetast, men enn hava hesi ikki avgjørt nakran dyst**

GULLDYSTUR
*Jákup Mørk*

Talvan niðanfyri sýnir, hvussu tað hevur tørnað út, tá gullbiðlarnir leygardagin hava hitst í teimum trimum undanfarnu landskappingardystunum í hesum kappingarárinum. Sum tað framgongur av úrslitunum, so hevur tað hvørja ferð verið StÍF, sum hevur verið omaná, og í so máta munnu strandingarnir eisini vera eitt slag av favorittum undan brakinum.

Tað hevur eisini víst seg seinnu árini, at hóast VÍF hevur verið ovari av teimum báðum liðunum síðani 1999, so hevur StÍF ferð eftir ferð argað gula herin, ið aloftast hevur havt tað trupult móti ágangandi verjuspælinum hjá StÍF.

Tá tað kemur til einstøku leikararnar, so er tað tó ein vestmenningur, sum hevur skotið flestu málini. Áki Olsen hevur ikki færri enn 25 smekkað bóltin í kassan teir tríggjar dystirnar, sum yvirlitið inniheldur, og av hesum vórðu ikki færri enn 11 skotin í seinasta dystinum. Tað var tó tann av dystunum, sum VÍF tapti við greiðastu dystartølunum.

## Hondbólturin vinnur

Hvussu tað verður hesaferð, er tó meira enn trupult at spáa um. Tó at talan er um lítlan favoritt-leiklut til strandingarnar, so eru tað ikki hagtølini, sum avgera nakran dyst. Her verður tað í stóran mun dagsformurin hjá báðum pørtum, men fyri undirhaldið í høllini, áskoðararnar og ikki minst fyri hondbóltsspælið er at vóna, at báðir partar spæla upp til sítt allarbesta. Tá verður tað føroyskur hondbóltur, sum verður tann stóri vinnarin.



*Áki Olsen er tann leikarin, sum hevur skotið flestu málini, tá VÍF og StÍF hava spælt í ár, og ivaleyst seta vestmenningar stóran part av álitinum á skotstyrki hansara leygardagin*

| | | | | VÍF | - | StÍF | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | 25 | - | 31 | | | |
| | | | | 29 | - | 32 | | | |
| | | | | 27 | - | 34 | | | |
| **út** | **mál** | | **Leikari** | | | **Leikari** | **mál** | | **út** |
| 3 | 25 | (3) | Áki Olsen | | | Sveinur Justinussen | 23 | (2) | 3 |
| | 15 | | John Zachariasen | | | Artur Johansen | 21 | (11) | |
| | 12 | (2) | Piti Negru | | | Costin Dumitrescu | 19 | (5) | 1 |
| 1 | 8 | | Ingi Olsen | | | Alexandur Johansen | 12 | (1) | 1 |
| 1 | 7 | | Daniel Rápa | | | Jón Rasmussen | 6 | | 2 |
| | 5 | (1) | Áki G. Olsen | | | Andre F. Danielsen | 6 | | |
| 2 | 4 | | Agnar Joensen | | | Kristjan Petursson | 5 | | |
| 3 | 3 | | Ólavur Brimnes | | | Bent Djurhuus | 4 | | |
| | 1 | | Fríðbjørn Seloy | | | Borgar Danielsen | 1 | | 1 |
| | 1 | | Rógvi Nielsen | | | Janus Trúgvason | | | 1 |
| | | | | | | Pauli Hansen | | | 1 |

# Hondbóltsstøður

**1. Deild kvinnur**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VB | 11 | 10 | - | 1 | - | 0 | 600 | 482 | 118 | 30 |
| 2 VÍF | 11 | 7 | - | 2 | - | 2 | 538 | 448 | 90 | 24 |
| 3 StÍF | 11 | 6 | - | 1 | - | 4 | 552 | 552 | 0 | 19 |
| 4 Stjørnan | 12 | 4 | - | 1 | - | 7 | 529 | 530 | -1 | 17 |
| 5 Kyndil | 11 | 4 | - | 1 | - | 6 | 554 | 563 | -9 | 15 |
| 6 Neistin | 11 | 4 | - | 0 | - | 7 | 474 | 517 | -43 | 13 |
| 7 Tjaldur | 11 | 1 | - | 0 | - | 10 | 430 | 585 | -155 | 3 |

**1. Deild menn**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 StÍF | 11 | 8 | - | 2 | - | 1 | 671 | 578 | 93 | 27 |
| 2 VÍF | 11 | 8 | - | 0 | - | 3 | 722 | 608 | 114 | 25 |
| 3 Kyndil | 11 | 8 | - | 2 | - | 1 | 660 | 600 | 60 | 24 |
| 4 Neistin | 11 | 4 | - | 1 | - | 6 | 638 | 618 | 20 | 18 |
| 5 KÍF | 12 | 3 | - | 2 | - | 7 | 642 | 681 | -39 | 13 |
| 6 H71 | 11 | 4 | - | 0 | - | 7 | 587 | 677 | -90 | 11 |
| 7 Tjaldur | 11 | 0 | - | 1 | - | 10 | 583 | 741 | -158 | 4 |

**Bólkaspælið í kappingini um løgmanssteypið**

**Bólkur 1**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 NSÍ | 3 | 3 | - | 0 | - | 0 | 10 | 2 | 8 | 9 |
| 2 B68 | 3 | 1 | - | 1 | - | 1 | 5 | 7 | -2 | 4 |
| 3 TB | 3 | 0 | - | 1 | - | 2 | 2 | 11 | -9 | 1 |
| 4 FSV | 3 | 1 | - | 0 | - | 2 | 10 | 7 | 3 | 3 |

**Bólkur 2**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 EB/S | 3 | 2 | - | 1 | - | 0 | 6 | 1 | 5 | 7 |
| 2 VB | 3 | 1 | - | 2 | - | 0 | 4 | 3 | 1 | 5 |
| 3 KÍ | 3 | 1 | - | 1 | - | 1 | 5 | 5 | 0 | 4 |
| 4 AB | 3 | 0 | - | 0 | - | 3 | 1 | 7 | -6 | 0 |

**Bólkur 3**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 HB | 3 | 2 | - | 0 | - | 1 | 10 | 3 | 7 | 6 |
| 2 GÍ | 3 | 3 | - | 0 | - | 0 | 8 | 2 | 6 | 9 |
| 3 B36 | 3 | 1 | - | 0 | - | 2 | 2 | 5 | -3 | 3 |
| 4 Skála | 3 | 0 | - | 0 | - | 3 | 3 | 13 | -10 | 0 |

# Kyndil heldur galla á Platform

**26. apríl bjóðar Kyndil øllum hondbóltsleikarum í landinum til stórt gallakvøld, sum hesa ferð verður hildið á Platform í Havn**

GALLAKVØLD
*Jákup Mørk*

Hondbólturin var fyrsta ítróttagreinin her á landi, sum veruliga fekk lív í hugtakið, Gallakvøld. Hetta tá H71 á várið 1999 tók stig til stórsligið tiltak, sum varð hildið í Studentarskúlanum í Hoydølum.

Næsta árið vóru tað aftur hoyvíkingar, sum skipaðu fyri, men síðani varð mest sum gjørt av, at tiltakið skuldi út at ferðast. Fyrraárið vóru tað so tey í VÍF og í fjør VB, men leingi hevur stór óvissa valdað um, hvussu fór at verða við kvøldinum hesaferð.

Nú hevur Kyndil tó boðað frá, at tey saman við Platform fara at skipa fyri kvøldinum.

Hetta verður tann 26. apríl, og sum vera man, so verður nógv gjørt burturúr kvøldinum, sum hesa ferð er ókeypis hjá leikarunum..

Klokkan 21.00 verða dyrnar lætnar upp fyri leikarunum, sum til høvið fáa eina eksotiska buffét. Undirhald verður við Hilmar Jan Hansen, og seinni um kvøldið spælir Terji Rasmussen við manning til dans.

Hæddarpunktið á sjálvum kvøldinum verður sjálvsagt kjósanin av teimum bestu leikarunum, sum hava gjørt vart við seg hetta kappingarárið. Einasta av hesum, sum er avgjørt frammanundan eru sjálvandi bestu málskjúttarnir, og alt bendir á, at hesi eita Dragisa Stojovic og Daiva Toumaite. Restin verður verandi ógreitt til tað seinasta, tá ikki færri enn 13 virðislønir skulu handast umframt heiðurin fyri málskjótingina. Tað verða ársins málverjar, ársins venjarar, ársins álopsleikarar, ársins verjuleikarar, ársins dómarapar og so sjálvandi tey bæði, sum størsti spenningurin oftast er um. Nevnliga heiðurin sum ávíkavist ársins leikari og ársins stjørnuskot.

Meira verður ivaleyst at frætta um tiltakið seinni, men longu nú hava hondbóltsfeløgini kring landið fingið atkvøðuseðlarnar sendandi, soleiðis at fyrireikararnir kunnu fáa hendan partin av tiltakinum upp á pláss í góðari tíð.